# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eingin eigur at viðurkenna Mugabe sum lógligan forseta, og vit mugu fáa gamla mannin til samráðingarborðið (Tsvangirai)*

# Putin ávarar Ukraina ímóti NATO-limaskapi

**Ukraina eigur ikki at fara upp í NATO, tí tað fer at gera ta russisku verjuna veikari, sigur Vladimir Putin, forsætisráðharri**



*Forsætisráðharrarnir Julia Timosjenko og Vladimir Putin hittust í Moskva leygardagin*

Ukraina hevur søkt um limaskap í verjusamgonguni NATO, men á fundi í vár samdust ríkis- og stjórnarleiðararnir í samgonguni um at bíða við at taka støðu til umsóknina. Orsøkin til avgerðina var fyrst og fremst, at Russland vil ikki hoyra talan um, at Ukraina fer upp í NATO, og somu boð hevur leiðslan í Georgia fingið.

Leygardagin var ukrainski forsætisráðharrin, Julia Tomisjenko, í Moskva. Sum væntað var ukrainska NATO-umsóknin eitt av umrøðuevnunum millum hana og Vladimir Putin, sum nú er russiskur forsætisráðharri. Og boðini frá Putin vóru púra greið:

-Russland kann ikki góðtaka, at Ukraina fer upp í NATO, og Russland er til reiðar at ógilda verandi handilsavtalur landanna millum, um Ukraina ger álvara av sínari ætlan um limaskap.

### Fleiri trupulleikar

Ukraina hevur ein rættiliga ukfatandi vápnaídnað. Men at kalla øll framleiðsluútgerðin stavar frá gamla Sovjetsamveldinum, og tí hava verksmiðjurnar tørv á íløgum fyri at kunna standa seg í kappingini á altjóðamarknaðinum. Eitt handilsbrot við Russland hevði komið vápnaídnaðinum sera illa við, skrivar NTB.

Ein annar trupulleiki er tann russiski Svartahavsflotin, sum hevur støð í ukrainska havnarbýnum Sevastopol, men á fundinum leygardagin segði Julia Timosjenko, at Ukraina er sinnað at leingja verandi leigusáttmála um herflotastøðina til 2017.

Timosjenko og Putin samdust um at tryggja, at Ukraina kann fáa tað gass úr Russlandi, sum landið hevur brúk fyri. Fyri tveimum árum síðani fóru londini at keglast um prísin á gassi, og tað endaði við, at russar skrúvaðu fyri. So seint sum í vár hóttu russar aftur við at skrúva fyri, men tað varð tó av ongum.

# Sinnaður at tingast við Mugabe

**-Vit mugu fáa tann gamla mannin til samráðingarborðið sum skjótast, sigur Morgan Tsvangirai**

Meðan talsmenninir hjá Robert Mugabe hava úr at gera við at greiða frá, hvussu dyggan sigur forsetin vann seinasta vikuskiftið, roynir andstøðan at fáa hini londini í Afrika at nokta at viðurkenna úrslitið.

-Leiðararnir í afrikanska eindarfelagsskapinum mugu nokta at viðurkenna Mugabe sum lógligan forseta í Zimbabwe, sigur andstøðuleiðarin, Morgan Tsvangirai, við BBC.

Andstøðan vann tjóðartingsvalið í vár og hevur tí meiriluta har, og hetta eigur andstøðan at gagnnýta, sigur Tsvangirai. Hann vísir á, at flokkurin hjá Mugabe hevur viðurkent, at hann hevur ikki meiriluta í tinginum longur, og tí ætlar Tsvangirai at virka fyri at fáa tingið at samtykkja eina tíðarætlan fyri, nær Zimbabwe skal fáa nýggja grundlóg.

Sjálvur ivast Tsvangirai ikki í, at tað ber til at røkka málinum, men treytin er, at altjóða samfelagið heldur á at leggja trýst á Mugabe. Hann avvísir ikki møguleikanum at gera Mugabe til ein part av einari semju.

-Kanska kann hann halda fram sum forseti í einari skiftistíð, sigur Tsvangirai við BBC.



*Morgan Tsvangirai er sinnaður at tingast við Robert Mugabe*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

## Njósnari dømdur til deyða

Í Iran hevur dómsvaldið dømt ein mann sekan í at hava njósnast fyri Ísrael, og tað skal sambært dómsvaldinum kosta honum lívið. Ein tíðindastovan í Iran skrivar, at maðurin er dømdur til deyða fyri at hava arbeitt fyri ta ísraelsku fregnartænastuna Mossad. Tann dømdi, sum er 43 ára gamal, varð tikin fyri hálvum øðrum ári síðani, og roknað verður við, at hann fer at skjóta deyðadómin inn fyri hægri rætt, skrivar AP. Eygleiðarar vísa á, at orðalagið millum Iran og Ísrael hevur verið rættiliga hvast. Millum annað hevur tað ljóðað, at Ísrael hevur ætlanir um at søkja at málum í Iran.



*Bush og hinir leiðararnir hugsaðu ov stutt*

*Mynd: AP*

## Kríggið illa skipað

Ein drúgv frágreiðing avdúkar, at amerikanararnir høvdu als ikki fyrireikað seg nóg væl til tíðina, eftir at Saddam Hussein og stýri hansara vóru fallin. Frágreiðingin, sum er næstan 700 síður, umfatar tíðarskeiðið frá álopinum á Irak, til bardagarnir endaðu ío mai í 2003. Í frágreiðingini verður sagt, at bæði hernaðarligir og sivilir leiðarar hugsaðu at kalla bara um at berja irakska herin niður og at fáa Saddam Hussein frá. Harafturímóti varð alt ov lítið gjørt burturúr, hvat skuldi henda, ella hvat kundi henda, eftir at Saddam var fallin.